# TB nærkast í hvørjum



*Á Tvøroyri vilja tey ikki enn tosa um nakað FM-heiti, men eftir sigurin á Mjølnir ber illa til at sleppa undan heitinum sum stórfavorittur*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Eina løtu sá út til, at Mjølnir aftur fór at vinna í Suðuroy, men tá samanumkom bleiv tað ikki til nakra endurtøku. TB vann 3-1 og nú er sera, sera stutt eftir á mál hjá liðnum av Tvøroyri. Hinvegin sær stríðið um bronsumerkini ikki út til at fáa ein enda fyrr enn á síðsta leikdegi**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Fyri flogbóltskvinnurnar hjá TB var hetta vikuskiftið eitt av teimum týdningarmestu yvirhøvur. Tveir sigrar móti ávikavist Fleyr og Mjølnir, og TB kundi so gott sum kalla seg føroyameistara - og tað sjálvt um tær hava fýra dystir eftir í kappingini.

Og tað eydnaðist TB at vinna báðar dystirnar. Tær fingu ein óvæntaðan hvøkk móti Fleyr fríggjakvøldið og aftur ein móti Mjølni sunnudagin, men í báðum førum fingu tær umrátt seg so mikið at tað ikki bilti. Og niðurstøðan av øllum hesum er, at tað nú skal ganga ómetaliga illa í restini av kappingini, um fyrsta føroyameistaraheitið hjá TB í flogbólti ikki skal verða veruleiki.

Fleyrkvinnurnar komu suður fríggjakvøldið til ein dyst, sum ikki nógv góvu teimum nakrar serligar møguleikar fyri at vinna. Men tað skal sigast, at havnarkvinnurnar ikki smæddust burtur, og tað bleiv als ikki nakar lættur sigur hjá oddaliðnum.

Í byrjanini var annars ikki nógv sum bendi tann vegin, tí TB vann tvey tey fyrstu settini 25-15 og 25-17 uttan stórvegis trupulleikar. Men so kom stígur í, samstundis sum Fleyr gjørdi ein vørr og vann triðja sett 25-21. Í fjórða setti var heldur ikki nógv sum skilti liðini, men sum so ofta tá tað leikar javnt á, er tað liðið, sum er fremst í kappingini, sum dregur longra stráið. TB vann fjórða sett 25-23 og fekk tí tey bæði týdningarmiklu stigini upp undir oddadystin móti Mjølni - men tær máttu stríðast fyri stigunum.

## Avsmurningur einki at siga

Sunnudagin var so klárt til toppdystin, og serliga fyri Mjølnir ráddi tað um at vinna, so TB ikki skuldi fara fýra stig framum. Ein sigur til Mjølnir kundi hinvegin føra til, at liðini blivu jøvn í stigum og dystum.

Men heimaliðið tók fyrsta stikkið við at vinna 25-23, hóast munurin á liðunum var lítil og eingin.

Tá liðini møttust í Trongisvági í grundspælinum, vann Mjølnir 3-1. Tað var fyrsti og higartil einasti ósigur hjá TB, og leikararnir hjá báðum liðum mintust, at tá vann Mjølnir næsta sett heili 25-5. Tí var einki at siga til, at heimaáskoðararnir fóru at stúra eitt sindur sunnudagin, tá teir sóu mjølnirkvinnurnar vinna næsta sett 25-12. Tað sá næstan út til, at ein endurtøka av fyrra dystinum var í væntu, men tað segði TB kortanei til. Tær lyftu spælið uppaftur og vunnu triðja sett 25-22. Hesin sigurin í triðja setti bleiv sera avgerandi, tí hevði Mjølnir vunnið tað, er væl hugsandi, at tær høvdu vunnið dystin. Nú bleiv tað í staðin TB, sum fekk yvirvág bæði í hondunum og í høvdunum, avsmurningurin í øðrum setti var gloymdur, og í fjórða setti beindu tær allan iva til viks við at vinna 25-13. TB hevði vunnið 3-1 og samstundis tikið eitt stórt fet fram móti gullinum.

Á Tvøroyri vilja tey ikki enn tosa um nakað FM-heiti. Tað sigur seg sjálvt. Hetta við ikki at selja skinnið áðrenn bjørnin er skotin skal brúkast her sum so nógva aðrastaðni. Men hyggja vit at støðuni, síggja vit, at TB nú hevur allar møguleikar at vinna kappingina. Eitt er, at tær eru fýra stig frammanfyri Mjølnir, men settmunurin hjá teimum er eisini somikið nógv betri enn tann hjá Mjølni, at tær í roynd og veru skulu tapa tríggjar av teimum fýra írestandi dystunum fram til 3. mars. Tá spælir TB sín síðsta dyst í kappingini, sum annars ikki endar fyrr enn leygardagin 9. mars. Men tá hava tær frívikuskifti, og tað verður kanska eisini tiltrongt, tí tað er væl hugsandi, at tær tá longu hava feirað sítt fyrsta føroyameistaraheitið...

## Stríðið um bronsuna herðist

Alment er Dráttur enn føroyameistari, men sunnudagin mistu tær sín seinasta teoretiska kjans fyri at varðveita heitið. Tað hevur leingi verið greitt, at Dráttur - uttan fleiri av lyklaleikarunum frá í fjør - ikki fór at liggja framvið í ár - og seinasti møguleikin feyk, tá tær eitt sindur óvæntað taptu 3-2 móti ÍF á Kambsdali.

Hetta bleiv ein sera spennandi dystur við fimm settum, har serliga tað næsta var drúgt. Tað endaði 29-27 til Drátt!

Tá hevði ÍF longu vunnið fyrsta sett, sum eisini var tætt, 25-23. Tað triðja settið bleiv tað einasta í dystinum, har tað ongantíð var nakar spenningur í, tí tað vann Dráttur 25-13. Nú sá út til, at Dráttur fór at vinna dystin, men ÍF-kvinnurnar vístu veruligan sigursvilja sunnudagin, og tá tað eisini eydnaðist teimum at steðga sterkasta dráttarleikaranum Marinu Popovic, var dysturin alt annað enn avgjørdur. Fjórða sett vann ÍF 25-22, og í síðsta og avgerandi settunum vóru tær eisini drúgvari og vunnu tað 15-13. Tvey stig til ÍF, sum nú nærkast Drátti og bronsumerkjunum. Eitt stig skilir partarnar, og kappingin um bronsuna sær út til at gerast hørð. Tann kappingin verður kanska ikki avgjørd fyrrenn á allarsíðsta leikdegi, tá ÍF vitjar á Giljanesi. Annars hava Dráttur og ÍF júst tey somu mótstøðuliðini eftir at spæla ímóti. Bæði hava útidyst móti TB og heimadyst móti Fleyr eftir. Einasti munurin er, at ÍF skal spæla móti Mjølni á heimavølli, meðan Dráttur skal til Klaksvíkar. Um tað fær nakran týdning, er ilt at siga, men sum nú er, sær síðsti dysturin millum Drátt og ÍF út til at gerast dysturin um bronsuna.

### Úrslitini um vikuskiftið vóru:

TB-Fleyr 3-1 (25-15, 25-17, 21-25, 25-23)
ÍF-Dráttur 3-2 (25-23, 27-29, 13-25, 25-22, 15-13)
TB-Mjølnir 3-1 (25-23, 12-25, 25-22, 25-13)

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 12 | 11- 1 | 34 | 9 | 25 | 15 |
| 2 | Mjølnir | 12 | 8 - 4 | 28 | 18 | 10 | 11 |
| 3 | Dráttur | 12 | 5 - 7 | 23 | 25 | -2 | 6 |
| 4 | ÍF | 12 | 4 - 8 | 20 | 29 | -9 | 5 |
| 5 | Fleyr | 12 | 2 - 10 | 9 | 33 | -24 | 3 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 12 | 8 - 4 | 29 | 21 | 8 | 11 |
| 2 | SÍ | 12 | 8 - 4 | 30 | 17 | 13 | 10 |
| 3 | Fram | 12 | 8 - 4 | 29 | 20 | 9 | 10 |
| 4 | ÍF | 12 | 3 - 9 | 16 | 32 | -16 | 6 |
| 5 | Mjølnir | 12 | 3 - 9 | 16 | 30 | -14 | 3 |



# Deja vu hjá SÍ

**Fyri aðru ferð uppá tvær vikur megnaði SÍ ikki at binda um sekkin, tá møguleikin beyðst. Verður SÍ ikki føroyameistari í ár, so vita teir hvar teir skulu leita eftir teimum stigunum, sum resta í - tey vórðu mist í Gundadali og á Kambsdali**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*



*Fram vann um vikuskiftið tryggan 3-0 sigur móti Mjølni, sum nú fær ringt við at sleppa undan niðasta plássinum í deildini*

Um tað nú vísir seg, tá kappingin hjá monnunum er liðug, at SÍ ikki er føroyameistari, so vita sørvingar, hvar teir skulu leita eftir teimum stigunum, sum mangla. Fyrr í mánaðinum hevði SÍ fýra dystarbóltar móti Fleyr í Havn, men teir taptu dystin.

Móti ÍF á Kambsdali sunnudagin høvdu teir tríggjar dystarbóltar, men heldur ikki hesaferð fingu teir avgjørt, tá høvið beyðst. Og so takkaði ÍF fyri og vann 3-2. SÍ er so langt frá úti av FM-kappingini, men so jøvn sum kappingin er, so kunnu hesir báðir ósigrarnir gerast dýrir hjá sørvingum, sum annars hava lagt meira fyri í ár enn nakrantíð fyrr í royndunum at vinna føroyameistaraheitið.

Men ÍF er ikki tað sama sum ÍF fyri tveimum-trimum mánaðum síðani. Høvdu fuglfirðingar verið eins væl fyri í grundspælinum, sum teir eru nú, høvdu teir verið við í oddastríðnum, men endaspurturin er komin ov seint. Teir hava longu spilt spælið hjá Fleyr meir enn einaferð í hesum kappingarárinum, og sunnudagin var tað so SÍ sum átti tørn. Í einum ómetaliga spennandi fimmsettara vann ÍF síðsta settið 17-15, eftir at SÍ eitt skifti var á odda 14-11. Hetta settið var spennandi, men triðja sett stóð ikki nógv aftanfyri. Tað vann SÍ somikið sum 31-29! Um ikki annað, so skuldi hetta boðað frá góðum til steypafinaluna, sum verður um tríggjar vikur...

Tað var annars heimaliðið, sum legði best út og vann fyrsta sett 25-23. SÍ svaraði aftur við at taka tað næsta 25-18 og so eisini tað triðja við teimum áðurnevndu 31-29. Tað verður ofta sagt, at fyri moralin er einki so gott sum at vinna »teir langu bóltarnar«, men at vinna eitt so drúgt og javnt sett man eisini gera sítt til, at moralurin fer upp. Eisini tí eiga fuglfirðingar stóran heiður av, at teir komu so sterkt aftur. Eftir alt stríðið til onga nyttu í triðja setti gjørdu teir ikki mætari enn at vinna fjórða sett 25-21.

Bæði ÍF og SÍ hava royndar leikarar á liðnum, sum ofta fyrr hava verið við í einum tøttum síðsta setti, men bæði liðini hava eisini ungar leikarar við, og teir munnu hava fingið nógvar góðar royndir burturúr hesum dystinum, sum var tann kanska mest spennandi higartil í kappingini. Tað stóð nógv á, men tá SÍ í síðsta settinum vann seg uppá 14-11 og bara skuldi serva dystin heim, sá út til, at avgerðin var fallin. Men fyri ikki fyrstu ferð í ár noyddust sørvingar at ásanna, at dysturin er ikki liðugur fyrr enn seinasti bólturin er vunnin. ÍF bjargaði fyrst einum dystarbólti, so einum afturat, og so uppaftur einum, so støðan bleiv 14-14. Nú var vent í holuni, ÍF hevði viðrák, og fjáltur kom á SÍ, sum kanska eisini mintist gongdina móti Fleyr tvær vikur áðrenn. ÍF vann settið 17-15 og fekk tvey stig, sum teir í roynd og veru ikki kunnu brúka til so nógv í samlaðu myndini. Men sjálvan dystin kundu teir brúka sum best hugsandi upphiting til steypafinaluna millum somu liðini um tríggjar vikur. SÍ kundi hinvegin enn einaferð iðra seg um tvey stig, sum teir mistu í evstu løtu. Tað var ikki fyrstu ferð, og teir hava fingið okkurt at hugsa um til komandi dyst móti Mjølni í Klaksvík. Tað verður ein dystur sum má og skal vinnast, fyrst og fremst tí hetta ikki er besta tíðin á árinum at koma í ein aldudal. Vikuna eftir Mjølnir bíðar Fram í Havn, og so verður steypafinalan. So hetta verður ein strævin tíð hjá sørvingum - ein tíð sum fer at avgera, um tað verður »succes ella fiasko« hjá SÍ í ár.

## Fram er við aftur

Í mun til frálíka dystin á Kambsdali stóð hin mansdysturin sunnudagin - millum Fram og Mjølnir - eitt sindur í skugganum. Og hann bleiv heldur ikki so spennandi. Fram vann 3-0 móti Mjølni, sum nú fær ringt við at sleppa undan niðasta plássinum í deildini. Klaksvíkingar hava framvegis sín fyrsta sigur í endaspælinum til góðar, og sjálvt um teir sum oftast eru komnir upp á 20 stig ella meir í settunum, so skerst ikki burtur, at í trimum teimum síðstu dystunum hava teir ikki vunnið so mikið sum eitt einasta sett. Tá so ÍF heldur fram við at arga oddaliðini og vinna dystir, sær støðan hjá Mjølni bara enn daprari út.

Hjá Fram var bara eitt at gera sunnudagin, og tað var at vinna. Við 25-23, 25-18 og 25-21 var sigurin ongantíð veruliga í vanda, og liðið úr Eysturbýnum er nú við aftur har tað hendir - og fyri at siga tað sum tað er, hava teir ongantíð verið serliga langt burturi.

Og spenningurin í meistaradeildini hjá monnum heldur fram. Hyggja vit eftir støðuni, síggja vit, at Fleyr, SÍ og Fram øll hava vunnið átta og tapt fýra dystir í kappingini. Fleyr hevur tað eina stigið meir enn hini, tí teir hava vunnið mest í endaspælinum, og sjálvt um tað ikki ljóðar av so nógvum, kann tað fáa stóran týdning. Ikki minst tí Fleyr og Fram hittast longu komandi sunnudag í Gundadalshøllini. Her verður tað aftur alt ella einki fyri Fram, tí tapa teir, fara teir trý stig afturum, og tað kann vísa seg at gerast ov nógv.

Men tá tað er so javnt, sum tað er í løtuni, er hvør einasti dystur at rokna sum ein finala. Og fyri okkum áskoðarar er tað sjálvandi fínasta slag.

**ÍF-SÍ 3-2 (25-23, 18-25, 29-31, 25-21, 17-15)**
**Fram-Mjølnir 3-0 (25-23, 25-18, 25-21)**

## Aftur tap til Holte

**Flogbóltur: Bárður og teir í Holte máttu aftur hesaferð leggja rygg til eitt tap. Tað byrjaði annars væl, men so kom fjáltur á, og feilirnir, sum stóðust av tí, kostaðu ov nógv**

*Emil Lisberg Jacobsen*

Fyri Bárð B. Mikkelsen og teir í Holte hevur tað ikki gingið nakað serligt í seinastuni, og sunnudagin taptu teir so aftur, hesaferð móti DHG Odense á heimavølli.

Tað byrjaði annars »eftir ætlan« við, at Holte vann fyrsta sett 25-19, og spælið hjá Holte minti um tað, teir fyrr hava víst. Men so fór at ganga hinvegin. DHG vann trý tey næstu settini 25-22, 25-22 og 25-20, og so var liðugt hjá Holte.

Sum sagt byrjaði Holte væl, men tá so DHG so líðandi fekk sítt besta spæl fram, kom fjáltur á holtemenninar, og tað førdi til nógvar feilir.

Bárður sigur sjálvur, at venjingin síðstu vikurnar hevur verið góð, og at teir hava tosa nógv saman um tingini.

- Men vit hava ikki verið nóg góðir til at føra tað víðari til dystirnar, og tað er tað sum er galdandi, annars kann tað vera líkamikið, sigur Bárður B. Mikkelsen.

Leygardagin skal Holte so á vitjan hjá Gentofte Volley. Gentofte hevur heldur ikki vunnið higartil í endaspælinum, so Bárður og teir hava góðar vónir til tann dystin. Teir hava enn møguleika fyri at koma í hálvfinalurnar, men so má vánaliga gongdin vendast - jú fyrr jú betur.